tíðindablaðið sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
**Yngd:** Jákup Mørk

**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir

**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820
**Telefax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** Sosialurin

# USA og deyðarevsing

## *Oddagrein*

HESA seinastu tíðina hava vit hoyrt rættiliga nógv um uppstillingarvalini í USA. Heimsins mætasta tjóð skal til at kjósa sær nýggjan forseta, og hesin kann koma at stýra landinum og lutvíst øllum heimsbúskapinum næstu 8 árini. Nú kann ein føroyingur kanska siga, at tað viðkemur ikki okkum, hvør verður valdur til forseta í USA. Men tað ger tað í veruleikanum, vilja vit vera ein partur av heimssamfelagnum við ábyrgd og skyldum. USA hevur í mongum - uppá gott og ilt - virkað sum heimsins politi. Hetta hevur í einstøkum førum hepnast væl, men í mongum førum hevur tað verið minni heppið. Dømi um har USA hevur misbrúkt sítt vald er eitt nú, tá demokratiskt valdi Alliende var tikin av døgum í Chile. Tá var USA partur av misgerðini, og í dag vísa skjøl, at amerikanarar høvdu meira enn ein fingur við í spælinum, tá chilenski uttanríkisráðharrin doyði - varð myrdur - í New York - í eini sokallaðari ferðsluvanlukku.

UM somu tíð sum amerikanarar við røttum havast at Kina fyri tørvandi mannarættindi, fremur staturin USA í dag deyðarevsing, nakað, sum hoyrir diktaturstatum og fortíðini til. Hvussu kann nakar við virðing fyri mannarættindum hava nakra virðing fyri einum USA, sum hevur sum almennan politikk at taka fólk av døgum! Og tað er júst í hesum sambandi, at komandi forsetavalið kemur inn í myndina.  Og maðurin, sum eftir øllum at døma, kann gerast komandi amerikanskur forseti George Bush, junior, er ein av heitastu talsmonnunum fyri deyðarevsing. Sum guvernørur í deyðarevsingarstatinum Texas hevur hann júst nú um dagarnar vrakað ótaldar áheitanir um ikki at taka ein deyðadømdan av døgum. Hesin sigur seg vera ósekan, og tað er mangt, sum talar fyri hesum. Tað verður vanliga sagt, at ivin eigur at koma tí dømda til góða. Men so er ikki í USA. So er ikki í hugaheiminum hjá møguliga komandi amerikanska forsetanum, sami maður sum skal út at fordøma Kina fyri brot á mannarættindini.

TAÐ finnast óteljandi dømi um, at fólk eru dømd til deyða í USA, sum hava verið ósek ella har prógvini móti teimum ikki hava verið nóg góð. Hvussu mong eru ikki eisini dømini um, at politiið pentar saman skeivt próvtilfar! Vit vita eisini, at mong av teimum deyðadømdu hoyra til tey sosialt veikastu í samfelagnum, og tá USA ger alt ov lítið fyri tey veikastu, so er staturin eisini samsekur í gongdini. Europa eigur at standa sum ein maður og harðliga átala deyðarevsingina í USA.

*Sosialurin*

# Løgmaður skal kannast

Landsstýrismálanevndin heldur tað vera so mikið álvarsamt, at løgmaður møguliga hevur tagt upplýsingar fyri Løgtinginum, at nevndin fer at seta ein kanningarstjóra at kanna hesi viðurskifti.

Talan er um ein bygning hjá einum felag, sum landsstýrismaðurin í vinnumálum, Finnbogi Arge, eigur í.

Bygningin, sum Fiskimálastýrið heldur til í Yviri við Strond í Havn, hevur landsstýrið leigað og sett í stand.

### Átti at sagt frá

Dan R. Petersen, løgtingsmaður, hevur spurt løgmann um kostnaðin av hesum leigumáli. Eftir langa biðitíð hevur løgmaður svarað. Men seinni er komið upp, at løgmaður ikki hevur dagt frá, at landsstýrið umframt leiguna hevur brúkt væl av peningi til at seta bygningin í stand. Talan er um sama bygning, sum Toll- og Skattstovan flýddi úr, tí ikki var inniverandi av heilsuligum ávum.

Løgmaður hevur ikki sagt Løgtinginum frá hesum umvælingarkostnaði, og tað heldur Landsstýrismálanevndin, at hann átti at gjørt.

Tí fer nevndin at royna at fáa greiði á, um alt er farið fram, sum lógin fyrisetur í hesum máli.

**ej**



*Landsstýrismálanevndin vil hava ein kanningarstjóra at kanna, um løgmaður duldi upplýsingar fyri tinginum*



*Soleiðis sóu tey út, tá tey fóru at sláa tunnu á Argja skúla í gjár. Mynd: Jens Kr. Vang*

# Grýlurnar vóru í góðum lag

Í gjár var tunnusláttur ymsastaðni kring landið, og vit tóku eina mynd, tá børnini í Argja skúla fór at sláa tunnu fyrrapartin í gjár.

Har var hýrurin sera góður, og børnini høvdu rættiliga latið seg í grýluklæði.

Grýlurnar verða sjónligar um vikuskiftið og fyrst í næstu viku. Nógv ymisk tiltøk eru í dag og í morgin, alt frá dansi til tunnusláttur.

Og mánamorgunin fer 3'arin í SMS at taka myndir av grýlum ókeypis.

Hesar myndir verða so sýndar fram í 3'aranum mikudagin, og tá kunnu fólk keypa myndirnar, hava tey hug til tað.

Øll tey, sum framkalla filmar í føstulávintsvikuni, eru við í kappingini um eitt Olympus myndatól.



# Í øðini inn á útvarpssendara

*Tey, sum bara hava millumbylgjusendara útvarpsins at líta á, eru í øðini, tí tað kemur alt ov ofta fyri, at hann ikki virkar. Á Føroya Tele siga tey, at tey fáa ikki gjørt stórvegis, tí upphæddin til rakstur og viðlíkahald røkkur ikki*



*Fólk leita ofta til fánýtis eftir Útvarpinum á millubylgju. Mynd: Jens Kr. Vang*

SVEINUR TRÓNDARSON

Tað hevur fingið sinnini í kók, at millumbylgjusendari útvarpsins hevur verið so svikaligur í seinastuni. Útvarpið hevur fingið fleiri klagur um sendaran, men har fáa tey ikki gjørt stórvegis annað við klagurnar enn at vísa teimum til Føroya Tele, sum hevur raksturin um hendi.

Tað eru serliga sjómenninir, sum eru við sviðusoð, tá Mb-sendarin »dettur út«, tí hann er tað einasta teir hava at líta á. FM-sendarin røkkur nevniliga bara eitt sindur út frá landi. Men tað eru ikki bara sjómenninir, tí tey, sum eru í bili og í fleiri bygdum hoyrist FM so illa, at hon ikki kann brúkast.

### Gera okkara ítarsta

Á Føroya Tele situr Jens Julian Reinert við ábyrgdini fyri sendinetinum og hann váttar, at tað hava verið trupulleikar við millumbylgjusendaranum.

»Tað er rætt, men tað er ikki meiri enn náttúrligt, at trupulleikar stinga seg upp, tí sendarin er hóast alt tíggju ára gamal«, sigur Julian Reinert, »og vit skifta teir út tá teir fara, men tað eru ávísar lutir, sum vit hava havt trupult við at útvega«.

Hann greiðir frá, at ein av stóru trupulleikunum hjá Føroya Tele er, at tann fyritøkan, sum sendarin varð keyptur frá, er løgd saman við eini aðrari og síðani samanleggingina eru fleiri av lutunum tiknir av vøruskránni.

»Tað hevur so við sær, at tað ikki bara er sum at siga tað at fáa fatur á eykalutunum«, sigur Jens Julian Reinert.

Jens Julian sigur okkum, at tað eru ávísir lutir, sum eru farnir við tíðini, og sum skulu skiftast út. Millum annað er ein »skiftari«, sum skal syrgja fyri, at sendarin koplar upp á netið av sær sjálvum, tá streymslit hevur verið, sum ikki virkar, og tað hevur borið illa til, at finna ein nýggjan.

»Og tað verður ikki betri við tíðini«, sigur Jens Julian Reinert, sum væl skilir, at fólk gerast í øðini tá sendarin slóknar. »Men tað hevur verið betri seinastuni«.

### Hevur riggað sera illa

Í Útvarpinum situr tekniski leiðarin, Hans Andor Johannesen, við ábyrgdini fyri sendinetinum, men bara tí dagliga partinum. Viðlíkahald og trupulleikar, sum stinga seg upp tá sendarin slóknar, er ikki hansara borð. Men kortini kennir hann á sín kropp, at fólk eru ónøgd við tænastuna, tá sendarin slóknar í heilum.

»Í seinastuni hevur verið heldur frægari, men einaferð í januar var heilt galið. Tá vóru bæði Mb-sendarin og FM-sendarin í ólagi so tá var ringur standur«, sigur Hans Andor Johannesen.

Hann skilir væl, at fólk eru ill um at Mb-sendarin slóknar, tí á sjónum serliga og í fleiri bygdum er tað einasti sendari, sum hoyrist. FM-netið varð projekterað í 1970 og tá varð als ikki hugsað um, at tríati ár seinni fór ein stórur partur av Føroya fólki at lurta eftir Útvarpinum eitt nú í bili, ella á flakarvirkjum. »Og tí hava tey bara Mb-sendarin«, sigur Hans Andor, sum leggur afturat, at tað eisini í Havn eru fleiri støð, har fólk mugu brúka Mb, tí FM hoyrist so illa.

### Ov lítið sett av

Tað, sum teir báðir Jens Julian Reinert og Hans Andor Johannesen tykjast samdir um, uttan at teir vita av hvørjum øðrum er, at upphæddin, sum er sett av til viðlíkahald av sendinetinum, er heilt burturvið.

»Vit hava fingið fimm milliónir og vit hava 70 støðir kring landið, sum skulu haldast í gongd. Av teimum eru sjey høvuðssendarar«, sigur Jens Julian Reinert. Hann fær ikki sagt nágreiniliga hvussu stórur partur fer til Mb-sendaran, men hann viðgongur, at lutfalsliga verður nógv mest brúkt upp á tann eina Mb-sendaran, enn upp á FM sendararnar.

Hans Andor Johannesen sigur, at tað eftir hansara fatan er sett so lítið av, at tað ikki røkkur til raksturin og so er il.t at síggja hvussu tað skal røkka til viðlíkahald.

»Fyri mær tykist tað, sum tað er ov lítil politiskur vilji til at veita peningin«, sigur hann og hetta er júst sama niðurstøða, sum Jens Julian Reinert kemur til.

Tað er Finnbogi Arge, landsstýrismaður við Vinnumálum, sum hevur politisku ábyrgdina av sendinetinum hjá Útvarpinum og Sjónvarpinum, men tað bar tíverri ikki til at fáa eina viðmerking frá honum, tí hann var upptikin allan dagin í gjár.

# Bert smávegis óhapp

Hóast líkindini gjørdust rættiliga vánalig hósdagin, fekk løgreglan ikki fráboðan um nakað stórvegis óhapp.

Onkur bilur fekk smásnuddir, og í Kollafirði fór ein bussur hjá Bygdaleiðum út  av vegnum orsakað av vindi.

Vakthavandi á politistøðini í Havn sigur, at ein av grundunum til hesi smáóhappini er, at fólk lurta ikki eftir teimum ávaringum, sum løgreglan sendir gjøgnum útvarpið. Fólk halda ofta sum so, at tað man fara at ganga kortini og fara so tvassandi í vánaligum líkindum við vánaligari útgerð.

Av politistøðini verður sagt, at rættiliga ofta vísir tað seg, at ferðsluóhapp í hálku eru beineliðis avleiðing av, at koyrt verður við ov vánaligum dekkum. Og soleiðis var eisini hendan dagin, sigur vakthavandi á politistøðini í Havn.

**ej**

# Nýggj telefonbók á veg

Nýggj telefonbók verður borin út umleið komandi mánaðarskifti.

Jens Pauli G. Nolsøe á Føroya Tele sigur, at bókin í løtuni er til prentingar hjá prentsmiðjuni Oddi í Reykjavík og verður liðug seinast í mars. Síðan fer Postverkið at bera bókina út til felagarnar.

Telefonbókin fyri ár 2000 er djúptblá á liti og myndar ta digitalu framtíðina. Bókin, sum verður prentað í 40.000 eintøkum, er 564 síður til støddar. 52 síður størri enn tann gamla. Serliga eru tað GSM fartelefonkundarnir, sum gerast fleiri í tali, sigur Jens Pauli Nolsøe. Men eisini fastnetkundarnir gerast feiri í tali. Og eisini eru tær gulu síðurnar fleiri enn seinast.

Sum nakað nýtt, sigur Jens Pauli Nolsøe, verða tær gulu síðurnar nú eisini lagdar á Internetið. Hann sigur, at komandi ár verða allar fyritøkur í Føroyum at finna á Internetinum. Internetbókin, nummar.fo, verður dagførd regluliga. Einaferð um mánan, sigur Jens Pauli Nolsøe.

Tað er soleiðis, at til ber hjá fólki at fara inn á Internetið og boða frá broytingum og rættingum, sum so verða dagførdar. Til dømis, tá eitt navn, adressa ella nummar skal broytast.

Eisini fara el-mail adressurnar at vaksa í tali í telefonbókini. Tær verða tó ikki settar í uttan fráboðan, hóast tær eru Olivant adressur. Felagin skal sjálvur biða um at fáa adressuna við, á sama hátt sum gjørt verður við telefax. Adressan verður sett sum ein undirupptøka, sum kostar 57,- krónur fyri hvørja reglu.

ej

**Mest selda maskina 6. árið á rað**

**Mest seldi mini-gravari í Føroyum nakrantíð**




Sosialurin - 311820

**Við eini HANIX maskinu kann tú altíð kenna teg tryggan. Vit hava royndirnar, vitanina og tænastuna. Tað sigur ikki einki, at yvir 85% av øllum mini-gravarum í Føroyum eita HANIX.**

**O. K. HEILSØLA & MASKINUR**
**430 Hvalvík - Tlf. 422394**